†

## Andlát og jarðarferðir

Elinborg Feilberg, Ættað úr Vestmanna, búsitandi í Hoyvík, andaðist á Landssjúkrahúsinum, týsdagin, 66 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Dagurin**

**12. januar. Reinaldur.** Týskur riddari, sum gjørdist munkur í Köln, men varð myrdur sv steinhøggarunum umleið ár 1200, tá ið hann koyrdi undir teir í arbeiðinum at byggja eina kirkju. Týskt navn, sum merkir tann, sum hevur vald á Gudum

**13. januar. Tjúgunda halgi.** Jólini enda. Tá ið tey taldu jólini og kvóðu um alt tað, sum Sankta Mortan gav, kvóðu tey: tjúgu stútir, nú eru jólini úti. Tjúgunda kvøld hevur verið hildið sum høgtíðsdagur onkustaðni í Føroyum. Dagurin verður í álmanakkanum eisini róptur Hilarius, til minnis um ein biskup í Poitiers, ið var mettur høgt sum kirkjulærari og sálmaskald. Hann hevur yrkt sálmin. Tær Guð, sum ein ræður himni á. Hilarius doyði í árinum 36

**14. januar. Felix**, deyður umleið ár 260. Prestur í Nola, nærhendis Napoli í Italia. Nógvar eru frásagnirnar um hansara lítillátna lív og tær mongu undirgerðirnar hann útinti. Navnið merkir eydnur

# Heri verður sum fjøruti

Leygardagin 12. januar fyllir Heri Simonsen í Havn 40 ár. Heri er kendur sum skemtari, hermari og undirhaldari og nú eisini sum útvarpsvertur á Rás2. Hann skrivar greinar fyri Sosialin, umframt at hann er kendur sum stadionspeakari hjá B36 og á Tórsvølli, tá landsdystir eru. Nógv minnast hann eisini frá sendingunum „Loynimyndir" í Sjónvarpinum í 1994.

Heri er havnarmaður. Hann er føddur í 1968 í Esbjerg, sonur Ingu, f. Gunnarsson, úr Havn, og Árna Simonsen, sála, úr Fuglafirði. Frá 1969-70 búði familjan í Runavík og frá 1970-75 í Havn. Tey búðu í Manitsoq í Grønlandi frá 1975 til 1978, tá tey fluttu aftur til Havnar.

Eftir loknan barnaskúla og framhaldsdeild á Venjingarskúlanum og í Grønlandi, tók Heri HF-prógv í Hoydølum í 1986. Fyrst í 90-unum var hann á málskúla í Onglandi og á háskúla í Danmark. Frá 1995-96 gekk hann á Norðurlendska Fólkaháskúlanum í Kungälv í Svøríki og á Medieháskúlanum í Kristiansand í Noregi frá 1996-97.


*Tveir av vertunum á Rás2, Eyðfinn Drewsen og Heri Simonsen (h.m.) ílætnir sum leivdir frá Kalda Krígnum*

Heri hevur arbeitt sum postmaður í Havn í tveimum tíðarskeiðum, frá 1987-1994 og frá 1997-2007. Hann var álitismaður og varaálitismaður hjá postboðsbólkinum í Havn í fleiri ár og var eisini fyrsti tiltakslimur og virkandi nevndarlimur í nevndini hjá Føroya Postfelag í nøkur ár. Hann atkvøddi fyri samanleggingini við Starvsmannafelagið 5. oktober í fjør. Í 1988 var Heri yvirkoyrdur undir arbeiði sum postboð, og fekk hann ein sera álvarsaman løst - tað stóð um lív í fleiri dagar. Aftaná fýra mánaðars sjúkramelding fór hann til arbeiðis aftur.

Í føroyskum fótbólti er tað B36, sum stendur hansara hjarta næst og í enskum fótbólti er tað Machester United. Hann er ein av stovnarunum og formaður í føroyska fjepparafelagnum hjá Machester United.

Hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan starvsfelagar**

# Minningarorð um Regin Havn Rasmussen



Tað er trettandi og seinasti dagur í jólahalguni. Ljósini, ið eyðkenna høgtíðina, verða beind burtur og vit eru í tí myrka og mangan baldruta januar, har summarið sýnist at vera langt burtur. Uppaftur daprari gjørdist dagurin, tá deyðsboðini bórust um, at Regin Havn Rasmussen slóknaði tíðliga í morgun.

Regin Havn Rasmussen var klaksvíkingur og sigast má, at hann var av navnframum fólki her norðuri, sonur hin gitna Jóhan í Grótinum. Regin gjørdist maskinmeistari og baldist á sjónum í manndómsárum. Hann fann sær danska konu Birte, ið er sjúkrasystir, og tey búsettust í Danmark, har høgligari var at koma til og frá skipi. Men tað lá altíð í ætlanum hansara, at hann skuldi heimaftur til Klaksvíkar, tá hann gavst at arbeiða fyri aldur.

Eins og so mangir maskinmenn fekk Regin hoyribrek av arbeiði sínum í motorlarmi og tí gavst hann lutfalsliga tíðliga á arbeiðsmarknaðinum og hann og konan Birte fluttu tá heim til Føroya at búgva, fyrst eina stutta tíð í Hoyvík, síðan nøkur ár í Leynum og at enda, tá íbúðirnar undir Kráarbrekku vórðu tiknar í nýtslu, eydnaðist teimum eisini at fáa nøkur ár í Klaksvík.

Regin plagdi mangan skemtandi at taka til, at hann hevði ofta hugsað um, hvat hann fór at takast við, tá hann gjørdist eftirløntur, men hann hevði als ikki hugflog til at ímynda sær, at hann fór at fáast við felagsarbeiði, soleiðis, sum hann kom at gera.

Tað var nevniliga so, at Regin fór við systir síni á fund í Felagnum fyri Hoyribrekað og á hesum fyrsta fundinum var hann valdur til tiltaksmann, kom síðan í nevndina, var formaður har í trý ár og var tá eisini í Samskiftisbólkinum hjá MBF og í Starvsnevndini har. Alla staðni fylgdi Birte við honum og hjálpti við tí praktiska. Regin fór til arbeiðis við sínum stak positiva verumáta, altíð áhugaður, vinsælur, hjálpsamur og klárur at lurta. Men maskinmaðurin í honum fornoktaði seg ikki. Tað skuldi vera skil í og helst skuldu málini avgreiðast, so tey kundu leggjast til viks sum loyst. "So fingu vit tað uppá pláss", plagdi hann at taka til, tá okkurt mál var avgreitt.

Vit komu at samstarva í nevndini í Felagnum fyri hoyribrekað, og tey bæði Birte og Regin vóru fyrimyndarlig formanshjún. Regin setti seg væl inn í tingini, áðrenn hann í góðum samstarvi tók avgerð, men so fekst eisini glið á, tí hann vildi loysa mál í einum jaligum anda. Tvey dømi eru, hvussu tað eydnaðist at fáa apotekini at selja battarí til hoyritól, soleiðis at tey gjørdust lættari at fáa hendur á, og hvussu tað eydnaðist at fáa góðar karmar á einari nýggjari hoyriklinikk. Tað lá Regini nógv á hjarta, at umstøðurnar vóru tryggar og góðar á hoyriklinikkini. Hann var eisni áhugaður í at kunna um hoyritólini og um telelykkjur.

Nýggj tøkni og framstig innan hoyritól hevði hansara áhuga. Hann fylgdi væl við á økinum og fann tíðindastubbar, vit kundu brúka. Einaferð hevði hann sæð eina sjónvarpssending við tónleikaranum Lotte Rømer, sum er hoyribrekað, og tað førdi til, at Felagið bjóðaði Lotte til Føroya at halda fyrilestur og hava konsert. Hon gisti hjá Regini og Birte og tey koyrdu hana alla staðir og vístu henni blíðskap. Tiltakið eydnaðist framúr væl.

Í 1998 varð hildið Heilaár, og tá hevði MBF funnið uppá at leigað gomlu Ternuna og skipa eina framsýning umborð. Regin og Birte ferðaðust um landið við skipinum og høvdu umsjón við framsýningini. Tey egnaðu seg so væl til at standa fyri slíkum tiltøkum, tí bæði vóru blíð og fyrikomandi og dugdu væl at fara við fólki, men vóru samstundis praktisk og kundu loysa trupulleikar, sum tóku seg upp.

Regin var ein virkin pensionistur, tey ferðaðust nógv og vóru fleiri vetrar á rað á Malta. Tey høvdu stóran áhugað fyri harmonikutónleiki og vóru altíð fús at undirhalda, tá heitt varð á tey - eitt nú við "Sóljubandinum" úti í Dagtilhaldinum Sóljuni í Klaksvík. Regin dugdi væl at liva, var altíð á ferð til okkurt, áhugaður og hjálpsamur, altíð fúsur at koyra fyri onnur og dugdi hann at síggja tað skemtiliga í gerandis upplivingum. Tað, sum var so serligt fyri hann, var tann positivi hugburður og verumáti, hann møtti øllum menniskjum við. Aldur sást ikki á honum - hóast hann nú var farin um tey 75.

Men knappliga broyttist alt, tá hann seinasta vár fekk boð um, at hann hevði krabbamein. Eisini tá vísti hann opinleika og tók boðini sinniliga. Hann vónaði sjálvandi, at hann fór at fáa heilsubót, hóast hann visti, at útlitini vóru vánalig. Men soleiðis skuldi ikki vera. Nú er hann farin í morgun.

Tankarnir leita til Birte. Tey bæði sóust altíð saman, men nú situr hon einsamøll eftir.

Felagið fyri Hoyribrekað hevur mist ein góðan vin. Vit, ið varða av hesum felag, hava mist ein góðan samstarvsfelaga, sum vit fara at minnast í takksemi og eisini við einum smíli við minni um mangar góðar løtur.

Sjálv siti eg í kvøld við tár á kinn og syrgi ein góðan vin - eitt stás fólk, sum saknur verður í. Tað er ein myrkur og dapur dagur, men ljós er fyri stavn, skjótt fer ljósið aftur at vinna á myrkrinum eins og ljós minnir vónandi fara at vinna á sorgini sum frá líður.

Birte og døtrunum og systkjum Regins við familju sendi eg samkenslukvøðu.

Friður veri við minninum um Regin Havn Rasmussen.

**Nicolina Dahl**